

*- Í longdini hevði tað verið bíligari at lagt rækjuskipið, tí raksturin er 5 miljónir krónur eftir reyv um árið, sigur Petur H. Jacobsen, reiðari*

# Gevið rækjuflotanum betri kvotur

**- Sum er, gongur tað eftir reyv við einari miljón fyri hvønn túrin. Hetta svarar til einar 5 miljónir krónur í halli um árið. Hesar 5 miljónirnar, sum Sólborg hevur í halli, rindar Krúnborg av sínum yvirskoti - niður í eitt stórt hol, sigur Petur H. Jacobsen, reiðari**

RÆKJUVINNAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Støðan hjá rækjuflotanum, sum einaferð var okkara "gullnám" í fiskivinnuhøpi, er óbroytt og líka so trupul, sum hon hevur verið seinastu árini. Tí kom tað dátt við hjá rækjumonnum, tá ið tað frættist, at ætlaða skattaafturberingin uppá 28% í fyrstu syfti verður av ongum.

Petur H. Jacobsen, reiðari á rækjutrolaranum, Sólborg, sigur, at ætlaða afturberingin hevði merkt einar 2 miljónir fyri hvørt rækjuskipið um árið.

– Vit hava bíðað eftir hesi skipan í fleiri mánaðir, og nú hon eftir øllum at døma verður av ongum, kenna vit okkum rættiliga hildnar fyri gjøldur av okkara myndugleikum, sigur hann og heldur fyri, at grundgevingarnar fyri ikki at seta hesa skipan í verk ljóðaðu undarligar í hansara oyrum.

## Rækjukvotur

Petur sigur, at tað, sum rækjumenn í fyrsta lagi vilja, er ikki at fáa pening úr landskassanum.

– Vit kundu heldur hugsað okkum, at føroysku myndugleikarnir útvegaðu okkum góðar rækjukvotur, eitt nú á Grand Bank og í Eysturgrønlandi, har skítfult av rækjum eru í báðum førum.

Reiðarin hevur tó ringar vónir um, at føroysku myndugleikarnir fara at megna at útvega rækjuskipunum betri veiðirættindi, sum geva meira pening, tí sum hann tekur til, at teir tora nóg illa at skriva út eitt gágguloyvi!

Hann sigur, at í ár eydnaðist tó okkara myndugleikum at fáa 174 tons í part fyri hvørt skipið á Grand Bank.

– Her vóru so nógvar rækjur at fáa, at vit fiskaðu kvotuna upp á tríggjar dagar, harav vit tann fyrsta dagin fingu 42 tons. Tað er munur á at fáa so stórar nøgdir og so tey umleið seks tonsini, sum vit fáa um dagin á Flemmish Kap, sigur reiðarin.

## Stórt hall

Petur sigur, at hvør túrur hjá einum rækjubáti sum Sólborg gevur í miðal eitt hall upp á 1 miljón krónur.

– Vit gera einar fimm túrar um árið, og tí er raksturin eisini einar 5 miljónir krónur eftir reyv um árið. Hallið verður rindað av yvirskotinum hjá Krúnborg, og vit kenna tað, sum um hesar miljónirnar fara niður í eitt stórt hol.

Hann sigur, at tað í longdini hevði verið bíligari at lagt rækjuskipið.

– Men ert tú í vinnuni, vónar tú alla tíðina, at gongdin fer at venda, og haraftrat kemur, at lítil marknaður er fyri rækjuskipini, um vit vildu selt tey.

Petur sigur, at tað hevði verið ógvuliga munagott, um hvør bátur fekk eini 500 tons í Eysturgrønlandi, har vit annars hava 115 tons fyri hvønn bátin.

– Rækjurnar í Eysturgrønlandi kunnu seljast fyri einar 45 krónur í miðal fyri kilo. So, hetta hevði virkuliga gjørt góðan mun í rakstrinum.

Hann vísir á, at summi ár hava føroysk reiðaríir keypt rækjukvotur frá grønlendskum reiðaríum, men hetta góðtekur grønlendska heimastýrið ikki longur.

– Heimastýrið sigur við grønlendsku reiðaríini, at tey fáa ikki meira rækjur, um tey longu hava so stórar kvotur, at tey kunnu selja burtur av. So, hetta ber ikki til longur, sigur Petur.

## Ikki bara grenj

– Um onkur heldur, at vit rækjumenn bara grenja, so er tað ikki rætt.

Reiðarin sigur, at nú meðan Sólborg hevur ligið á Skála, har skipið hevur fingið nýggja gron, hava teir roynt at gera ymiskt við verksmiðjuna, soleiðis at hon verður meira effektiv og rentabul.

– Vit royna at gera tað, vit kunnu, men tað gongur ikki kortini, sigur reiðarin, Petur H. Jacobsen

Sólborg hevur ligið á Skála í tveir mánaðir, meðan teir hava skift gron.

Herfyri fóru teir aftur nýggjan túr – og enn einaferð bar leiðin yvir á Flemmish Kap.



FØROYA GASSØLA
*Veitari av gasstøkni og útbúnaði*

AGA
*Íðnaðargass*

bp
*Propangass til vinnu og húsarhald*

ESAB
*Sveisitøkni*



**Fjølbroyttur veitari til vinnuna**

KJ er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastur til fiskivinnuna, alivinnuna, flutningsvinnuna og entreprenørvinnuna.

Í okkara úrvali av útgerð finnast m.a. trolspøl, kranaspøl, marinekranar, lastbilakranar og gravmaskinur.

Í okkara stóru eykalutagoymslu hava vit hydraulikkfittings, slangur, rør, pumpur, motorar, ventilar, koplingar, tetningsringar o.m.a.

- Spøl
- Kranar
- Hydraulikklutir
- Filtur
- Aliútgerð
- Katamaranar





KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL

Postsmoga 110 Kambsdalur
FO-530 Fuglafjørður
Tel +298 444 170 · Fax +298 444 265
info@kj.fo · www.kj.fo

**SKIP OG BÁTAR GSM-TELEFONIR**

Nú GSM netið verður útbygt til skip og bátar

hava vit tær vælumtóktu Nokia 6090 GSM telefonirnar til fastmontering.

GSM-telefon sum kann senda og móttaka: Telefon, data, fax og SMS

Ein sera vælumtókt GSM-telefon til skip og bátar.

Somuleiðis hava vit fleiri snið av Procom GSM antennum.

Avmarkað nøgd á goymslu

Tann sum kemur fyrst til mylluna

SP/F CONTRIVE JSP LTD.
FO-700 KLAKSVÍK · TEL 45 52 44 - 21 42 44 · FAX 45 69 45 · E-MAIL: CONTRIVE@CONTRIVE.FO



**Termografi**
Til øll endamál
* El-installatiónir * Lekar á Gólvhita
* Bjálving * Og mangt annað

**SKF-Legur og Smyrjingar**



SKF
LINCOLN

P/f Ídnaðartøkni
www.skf.fo
TLF 444 830 Fax 444 831